# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.



## Toftakona sjeyti

Í gjár, sjálvan líradagin, fylti Inger Mikkelsen á Toftum 70 ár.

Inger, ella Inga Maria, sum hon er doypt, er dóttir megnar hjúnini Elspu og Tummas Hansen í Gerðinum á Nesi, sum untust at hava jarnbrúdleyp áðrenn tey løgdu árarnar inn eftir eitt langt og ríkt lív.

Sum ung genta fór Inger til Havnar at tæna. Hon tænti hjá Leif Mohr og síðani hjá Leivuri Lutzen. Frá 1953 arbeiddi hon á Hotel Annex í Keypmannahavn. Og heimaftur komin fór hon eina tíð at vera í húsi hjá Hildborg og Óla á Forð á Nesi.

Í 1956 giftist Inger við Hans Mikkelsen, Hans í Torbisgerði á Toftum og flutti inn higar at búgva. Tey eiga fýra børn. Jón og Kári búgva í Danmark og Tórður og Eilis búgva í Hoyvík. Ommubørnini eru 12 í tali.

Meðan børnini vóru smá var tað sum hjá føroyskum kvinnum flest. Hennara leiklutur var at røkja húsið meðan maðurin var á sjónum og forvann til lívsins uppihald.

Tá børnini vóru undan komin, fór Inger at starvast sum heimahjálp. Tað dámdi henni væl. Seinni fór hon at starvast á Vistarheiminum við Toftavatn. Men tá Hans versnaði nógv av parkinsonsjúkuni og kravdi røkt, var Inger trúføst um mannin líka til hann andaðist í februar mánað í fjør.

Við sínum lætta sinni og smittandi látri verður Inger ofta miðdepil, har hon er. Um tað so er á eldrasamkomu í Missiónshúsinum ella tá pensiónistarnir svimja í Tofta skúla ella aðra staðni. Millum mangt annað er vert at nevna, at Inger er drívmegin í einum gongubólki av kvinnum, sum hvønn morgun ganga ein langan túr.

Sang hevur Inger altíð dámt væl og hon hevur við síni vøkru sopranrødd sungið bæði við barnakórinum og blandaða kórinum hjá Hans Jákupi Højgaard. Í mong ár sang hon eisini í Tofta Streingjakóri, og tey ferðaðust til missiónsvikur og onnur tiltøk kring landið fyri at boða evangeliið.

Inger er burturstødd føðingardagin.

## Dagurin

**27. august. Gebhardus,** deyður í 995. Biskupur í Konstanz í Týsklandi, liggur grivin í kleysturkirkjuni har, sum hann sjálvur sigst at hava latið byggja.

## Finnbjørn Mouritsen 65 ár



Í dag, mikudagin 27. august, fyllir Finnbjørn Mouritsen í Havn 65 ár. Finnbjørn er føddur og uppvaksin í Havn sum næstyngstur av fýra brøðrum. Foreldrini vóru Alvilda og Andreas Mouritsen, vanliga nevndur Gubbi, í Havn.

Finnbjørn fór í 1952, sum 14 ára gamal, í læru hjá Føroya Keypsamtøku í Bringsnargøtu í Havn. Hann var eisini við tá Keypsamtøkan keypti húsini í Dr. Jacobsensgøtu, har nýggjur bygningur seinni bleiv bygdur.

7. september 1962 lótu Finnbjørn og bróðirin, Eyðun Mouritsen, upp ein málingahandil í kjallaranum hjá Linu Arge við J.C. Svabosgøtu í Havn. Gólvvíddin var einans 24 fermetrar. Men teir løgdu út við eini óvanliga góðari tænastu, so virksemi vaks skjótt, og í 1965 var tí bygt afturat húsunum hjá Linu niðaneftir. Men virksemi vaks alsamt, og í 1970 var aftur bygt uppí. Hesin bygningur var 600 fermetrar í trimum hæddum.

Í 1975 keyptu teir eitt grundstykki uppi í Hoyvík og bygdu ein 1.500 fermetrar stóran handilsbygning. Fyrst í 80-unum bleiv hesin bygningur við 1.500 fermetrum afturat. Í hesum handlinun seldu teir eisini teppir og møblar. Um hetta mundið fingu teir eina deild á Tvøroyri.

Í 1989 bleiv flutt inn í stóra handilsbygningurin á Sandvíkarhjalla, ið er 4.800 fermetrar til víddar.

Málingahandlarnir virka í dag undir heitinum Litaval. Finnbjørn er í dag deildarleiðari í stóra handlinum á Sandvíkarhjalla, meðan bróðirsonurin, Jóannes Mouritsen, er stjóri á fyritøkuni.

Finnbjørn er ein maður við ferð á, altíð til reiðar at hjálpa og vegleiða kundunum. Hann er giftur við Margit, f. Mortensen, av Argjum. Tey eiga tveir synir, Andreas, 25 ár, og Peter, 23 ár.

## Bill Justinussen 40 ár

Í dag, mikudagin 27. august, fyllir landsstýrismaðurin Bill Justinussen 40 ár. Hann varð føddur á Glyvrum, sonur Gunvá, sum er úr Klaksvík, og Bjørn Justinussen av Glyvrum.

Bill hevur studentsprógv úr Hoydølum, handilsskúlaprógv og 1. part av HD. Hann hevur starvast sum bókhaldari og grannskoðari.

Hann hevur havt stóran áhuga fyri politikki og samfelagsviðurskiftum sum heild og var við til at stovna Miðflokkin. Hann var floksformaður í nøkur ár og skrivari í 2 ár. Hann hevur eisini havt ymisk álitisstørv – í stýrinum fyri Landssjúkrahúsið 1989-91 og skúlastýrinum fyri Runavíkar Skúla 2001-2002. Hann er religiøsur maður og er við í leiðsluni fyri eina samkomu, sum kallast Lívsins Orð.

Tá Miðflokkurin gjørdist ein av fýra flokkum eftir valið í apríl í fjør, gjørdist Bill landsstýrismaður í familju- og heilsumálum.



## Martin Joensen 50 ár



Martin Joensen, tónasmiðjur, yrkjari, grafikari og teknari fyllir fimmti ár mikudagin 27. august. Foreldur hansara vóru Emil Joensen av Heygum og Maria Jacobsen av Vatnsoyrum. Martin vaks upp sum næstelstur av 4 systkjum í Vestmanna, har hann rættiliga tíðliga fór at gera vart við seg innan tónleikin, hann leikti m.a. við bólkinum, Fox. Flestøll kenna lagið frá sjeytiárunum, Svarti Ravnur, sum Martin hevur gjørt orð og lag til, og sum Kræklingar spældu inn í 1976. Martin hevur lisið til grafikara á Skolen for Brugskunst (í dag Danmarks Designskole) í 1978 og tók prógv higani sum teknari og grafikari í 1982. Í Keypmannahavn var Martin eisini virkin luttakari í føroyska tónleikaheiminum. Heimafturkomin til Føroya var hann ein av trimum oddamonnum í bólkinum, Vestmonnum, ið var ein av best umtóktu bólkunum í áttatiárunum. Í 1985 gav hann út egið kassettuband, »Morgun«, hvørs heitislag hvørt føroyskt mansbarn mann kenna. Martin gjørdi sangleikin, »Skuggagestir«, umframt at hann gav út bandið, »Blátt í støðum«.

Saman við Martini Næs fekk Martin Joensen barnabókmentavirðisløn M. A. Jacobsens í 1980 fyri bókina, »Per og eg«, og í 1983 vann hann eina útvarpskapping við yrkingini, »Ró«.

Í Grønu songbók eigur Martin Joensen 36 sangir, sum hann í flestu førum hevur gjørt lag til.

Martin giftist í 1982 við Jóhonnu Zachariassen úr Havn, og tey eiga børnini Atla f. 1983, Sakaris, f. 1987 og Maluna, f. 1994. Síðani 1. oktober 2001 hevur Martin starvast sum grafikari á Menningardeildini hjá Føroya Banka.





*Óli, konan Kirsten og yngsti sonurin Tróndur*



*Ein av gestunum var annar av bretsku embætismonnunum, sum hava verið á kanningarferð í Føroyum. Her saman við Jákupi Sólstein og Óla Jacobsen.*

Føgur orð um Óla Jacobsen á 60 ára degnum:

# Góður at samstarva og gera avtalur við

**– Ein forstáiligur maður, góður at samstarva við og praktiskur vóru nøkur av rósandi orðunum formaðurin í Fiskimannafelagnum, Óli Jacobsen fekk á sínum 60 ára føðingardegi, tá opið hús var á Bryggjubakka**

FØÐINGARDAGUR
*Orð og myndir: Jan Müller*

Mong høvdu leitað sær í føðingardag hjá Óla Jacobsen, formanni í Fiskimannafelagnum, tá hann fylti 60 ár hósdagin í farnu viku. Eisini Sosialurin var millum gestirnar. Samtíðis var hetta eisini fyrsta høvið hjá fólki at síggja nýggju og góðu umstøðurnar á ovastu hædd í bygninginum hjá Fiskimannafelagnum á Bryggjubakka, har stór útbygging nýliga er farin fram.

Óli Jacobsen er ikki bert kendur frá sínum trúgva og drúgva arbeiði í Fiskimannafelagnum. Hann er eisini kendur sum ein av teimum mest ídnu debatørunum í samfelagnum, ein av teimum, sum ikki er bangin fyri at siga sína hugsan og at dokumenterað og undirbyggja hana. Hann hevur so eisini eina fortíð sum politikari.

Føðingardagsbarnið fekk nógvar heilsanir og hildu fólk seg ikki aftur at siga nøkur góð og positiv orð. Millum røðararnar vóru tríggjar kendar røddir frá fiskivinnuni, Osmund Justinussen, Henrik Old og Jákup Sólstein.

Henrik Old, løgtingsmaður og formaður í Vinnunevnd løgtingsins hevði alt gott at bera Óla á runda degnum.

### Góður at samstarva við

– Man má siga um Óla, at hann hevur verið ótrúliga góður at hava við at gera, sjálvt um hann, sum tað stendur í blaðnum, til tíðir kann øsa seg upp. Ta síðuna kenni eg so einki til. Henrik Old vísti til tíðina frá arbeiðinum hjá nevndini fyri Lønjavningargrunnin og segði, at har vórðu nógvir smáir trupulleikar loystir, áðrenn tað blivu til stórar trupulleikar.

– Men tann skipanin fekk ikki loyvi at halda fram og tíverri má man siga, at tað er nógv, sum gjørdist stór problem, tí tað ikki varð loyst beinanvegin. Henrik Old helt fyri, at eisini seinni, tá Óli Jacobsen kom á tann politiska pallin, fingu teir eitt gott samstarv.

– Vit vóru í Vinnunevndini saman, har tað til tíðir var sera buldrasligt. Óli hevur verið ótrúliga áhugaður í at fáa nøkur ting at virka í hesum samfelagnum. Ikki minst tá tað hevur gingið illani og hevur staðið minni gott til.hevur hann hildið mótið uppi.

Henrik Old helt eisini fyri, at tað at man hevur við ein mann at gera, sum sær uppá tingini á ein praktiskan máta, er ómetaliga umráðandi í einum samfelag, sum er soleiðis skrúvað saman sum okkara.

– Tað skal tú hava hjartans tøkk fyri.

### Forstáiligur

Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum helt fyri, at Óli Jacobsen er ein ótrúliga fortáiligur maður.

– At gera sáttmálar kann vera sera torført, tá talan er um tað skrivaða orðið. Men Óli er av slíkum slag, at tá man hevur gjørt eina avtalu, so eru báðir partar samdir um, hvat hon merkir. Tá hava vit ongantíð havt nakrar trupulleikar av henni, meðan aðrir partar av fiskivinnuni eru øðrvísi. Vit hava arbeitt saman leingi og hava havt eitt sera gott samstarv.

Jákup Sólstein nevndi so eisini fiskidagaskipanina, sum Óli og hann vóru á einum máli um og vísti til, at teir júst í hesum døgum høvdu verið á fundi við sendimenn frá Tony Blair, har teir greiddu frá okkara fiskidagaskipan, eini skipan, sum bæði Óli og hann vardu, tá tað vóru fleiri aðrar kreftir, sum vóru ímóti.

Ein av gestunum var annar av bretsku embætismonnunum, sum høvdu verið á kanningarferð í Føroyum.



*Henrik Old heilsar uppá Óla*



*Halgir Winther Poulsen, Knút Háberg og Hjarnar Djurhuus práta*